## Runavíkar Kommuna
### Tekniska Deild

Við hesum verður starvið sum leiðari á Teknisku Deild hjá Runavíkar kommunu lýst leyst at søkja.

Høvuðsverkevni:
- Leiðsla á Teknisku Deild
- Projekteringsarbeiði og eftirlit
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði
- Býarplanlegging og byggiplanlegging
- Málsviðgerð og ráðleggingararbeiði
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði
- Luttøku í dagligum umsitingarligum uppgávum v.m.

Førleikakrøv:
- Verkfrøðingur ella onnur viðkomandi útbúgving
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum
- Førleiki í projekteringsarbeiði og byggilist
- Munnligan og skrivligan málførleika (eisini í enskum)
- Hollan telduførleika
- Opin og fyrikomandi

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.
Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast við at venda sær til býráðsskrivaran á telefon 447035.

Starvið verður at seta sum skjótast.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 23.10.2000.

Runavíkar býráð

## VENJINGARHØLL Í HOYVÍK
### ÚTBJÓÐING Í FAKARBEIÐSTØKU

Vegna Tórshavnar Kommunu verður arbeiðið viðvíkjandi bygging av nýggjari Venjingarhøll í Hoyvík hervið boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið, ið verður útboðið í fakarbeiðstøku fatar um:

(1) Jørð-, kloakk- og betongarbeiði
(2) Timbur- og snikkaraarbeiði
(3) Gólváleggingararbeiði
(4) Málaraarbeiði
(5) Vatn-, hita-, sanitet- og ventilatiónsarbeiði
(6) Sterk- og veikstreymsarbeiði

Tey, ið hava áhuga í at bjóða, skulu boða frá í seinasta lagi 13. oktober 2000. Útbjóðingartilfarið verður sent teimum bjóðandi 16. oktober 2000 móti krossaðum kekki kr. 1.000,00 sum veðhald.

Lisitatión verður hildin í býráðsalinum hjá Tórshavnar Kommunu, mánadagin hin 6. november 2000 kl. 15.00.

**Veri-Con Pf**
Ráðgevandi verkfrøðingar
Lucas Debesar Gøta 9
100 Tórshavn
Tlf. 31 89 20
Fax 31 89 25

Teldupost adressa: veri_con@post.olivant.fo

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

## Maskinmeistari
### søkist til til Elfelagið SEV

**Starvið:**
Talan er um eitt starv sum vaktgangandi maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna. Undir Fossáverkið hoyra eisini Heygaverkið, Mýruverkið og Eiðisverkið. Hesi verk verða stýrd frá Fossáverkinum. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling).
Eisini verða linjurnar og koblingsstøðirnar stýrdar haðani (koblingsleiðsla).

**Útbúgvingin:**
Til starvið krevst full maskinmeistaraútbúgving ella onnur útbúgving, sum gevur í minsta lagi tilsvarandi maskin- og elektrotekniskan kunnleika.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært VI Iønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til SEV í Tórshavn (Bjarki Hermansen ella John P. Danielsen) ella til SEV í Vestmanna (Pól Joensen).

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Box 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 3. november 200.

Elfelagið SEV

## Føroya Tele

**Marknaðarfólk**

Marknaðardeildin á Føroya Tele hevur seinastu árini ment seg til ein týðandi part av eini fyritøku, sum menninst við rúkandi ferð. Alla tíðina leggjast nýggjar og áhugaverdar tænastur afturat innan øll virkisøki. Hetta er neyðugt til tess at vit varðveita okkara kappingarføri. Til at menna og víðka tænastugrundarlagið víðari tørvar okkum starvsfólk, sum megnar at liva upp til krøvini í okkara broytta umhvørvi.

Starvsøkið er kjarnuøkið hjá Føroya Tele, ið umfatar vanligt fastnettelefoni, ISDN, internet, fartelefonskipanirnar, boðtænastuna og eykatænastur. Í framtíðini koma nógvar nýggjar tænastur, og størri ferð verður á nógvum av verandi tænastum.

Uppgávurnar hjá nýggja starvsfólkinum eru m.a.
- Marknaðarføring
- Tænastumenning
- Søluuppfylging
- Samstarv við søluumboð
- Aðrar dagligar uppgávur á marknaðardeildini

Arbeiðið er sjálvstøðugt, tó í tøttum samstarvi við Marknaðardeildina og aðrar deildir á Føroya Tele. Vit hava hugsað okkum, at rætta starvsfólkið t.d.:
- Hevur hóskandi marknaðarliga/fíggjarliga útbúgving
- Hevur royndir innan sølu, marknaðarføring ella tænastumenning
- Hevur skil fyri og hegni til tøl
- Dugir væl føroyskt
- Dugir at finna kreativar loysnir
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.
- Dugir væl at seta seg inn í nýggja tøkni og at læra frá sær

Heldur tú, at tú kanst hjálpa Føroya Tele við hesum, ert tú vælkomin at søkja, eisini um orsøkin er ein onnur enn tær omanfyri nevndu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvsstaðið er í Havn og starvsbyrjan er skjótast gjørligt. Meira fæst at vita frá Jónhild Rasmussen á tlf. 303030.

Umsóknir skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi seinasta lagi 24. oktober 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
FO 110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*


JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn



NATEN 1-2-3
- mest selda kostískoyti nakrantíð. Inniheldur 96 ymiskar lívsneyðugar vitaminir og mineralir
-Ring og vit senda-
Naten søla
Tórshavn • Tel. 31 86 49
Sosialurin - 311820


## Jubileumsveitsla hjá Ljósinum

**25 ára jubileumsveitsla verður fyri limum við maka o.ø. Ljósafjepparum í B36-húsinum 21. oktober kl. 19.00.**

*Jørleif Kúrberg verður frásøgumaður undir borðhaldinum og Regin Jakobsen spælir harmoniku.*

*Matarskrá við trimum rættum, drykkuvørum og morgunmati seinni.*

*Ottar í Funningstovu spælir góðan gamlan og nýggjan tónleik eftir borðhaldið.*

*Kostnaður fyri veitsluna er kr. 250,-*

*Tilmelding innan 11. oktober hjá:*
*Salong Tótu, tel. 31 30 50 ella Wrangler Shop, tel. 31 47 10*

## Runavíkar Kvøld- og ungdómsskúli veturin 2000/2001

**Teldulæra við serligum atliti til WORD**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **DATA** | **Heimasíðugerð og INTERNETIÐ** | **mánakvøld kl. 19.30** | **Runavík** |
| Tilmelding: | Justin Philbrow | Tlf. 448241 | |
| **DATA** | **Tekstviðgerð fyri nýbyrjarar** | **týskvøld kl. 19.00** | **Runavík** |
| Tilmelding: | Maria í Skorini | Tlf. 423323 | |
| **DATA** | **Tekstviðgerð og telduhugtøk** | **mikukvøld kl. 19.30** | **Runavík** |
| Tilmelding: | Kristian Gaardbo | Tlf. 448083 | |

**Bókbinding**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Bókbinding** | | **týskvøld kl. 19.00** | **Hæddin** |
| Tilmelding: | Dan Reinert Petersen | Tlf. 444630 | |


## Seyðaskinn

*Í oktober og november keypa vit saltaði seyðaskinn*

*Fyri 1. floks lambsskinn geva vit kr. 25,-*
*Fyri 2. floks lambsskinn geva vit kr. 22,-*
*Fyri ærskinn geva vit kr. 22,-*
*(pesjur verða ikki móttiknar)*

*Móttøkustað: MBM Fóður, Kollafirði*

MBM
Sosialurin - 311820



Vit bjóða breitt úrval av inventar til:
- Goymslur
- Arkiv
- Vørubilar
- Arbeiðsrúm

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820





## Leiðaraskeið
### Leiðslumenning og læra at loysa trupulleikar - Leiðsluskeið 2
### Frá trupulleika til munadygga avgerð

**Endamál:**
At tú sum leiðari lærir at seta mál, skipa, stýra og menna eini avgerðarmannagongd hjá einum bólki, soleiðis at innlitið og royndirnar hjá øllum koma til gagns, og at ein munadygg avgerð verður tikin.

**Stevnumið:**
Eftir lokið skeið hevur tú fingið royndir og førleika í:
- At leggja arbeiði í einum bólki til rættis á ein hátt, ið tryggjar, at málið verður rokkið
- At skapa arbeiðsumstøður, ið tryggja, at uppgávur verða loystar á besta hátt
- At útnytta tilfeingi hjá hvørjum einstøkum luttakara til fulnar
- At hava umsjón við arbeiðinum í einum bólki soleiðis, at menning er í avgerðargongdini

**Arbeiðsháttur:**
Arbeiðshátturin gevur luttakarunum møguleika fyri:
- At royna seg við ymsum framferðarhættum
- At viðgera upplivingar og at læra av tí

Innanhýsis sjónvarp verður nýtt

**Innihald:**
Á skeiðinum fært tú venjingar í og vitan um:
- At taka dygdargóðar og samtykkiligar avgerðir
- At leiða út frá eini givnari støðu
- At leiða arbeiði við trupulleikagreining við at brúka:
  - trupulleikagreinig
  - arbeiðshættir
  - stýring
  - mannagongd
  - og greining av arbeiðsgongd í bólki

**Tíð:** Hósdagin 2. nov. 2000 kl. 09.00 til Leygardagin 4. nov. 2000 kl. 16.30
**Staður:** Hotel Eiði. Skeiðið er eitt internetskeið
**Skeiðleiðari:** Peter Gram og Gloria Kalsø frá LMB
**Kostnaður:** Kr. 7.000,- fyri hvønn, íroknað matur og gisting
**Tilmelding:** Hósdagin 19. oktober 2000

*LMB (LeiðsluMenningarBólkurin) er ein arbeisbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin Heystið 2000 fevnir um hesi skeið: Leiðsluframferð - Leiðslumenning og læra at loysa trupuleikar - Grundskeið í leiðslu.*

**Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum.**
**Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:**

LeiðsluMenningarBólkurin
**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS**
Marknagilsvegur 77 • Postmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374


## Nýggjar TANNPROTESUR
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!



Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til øll merkir av trukkum og stáblarum
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820


www.sosialurin.fo